# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*Skulu vit veruliga lyfta tey fremstu upp, so mugu vit tora at velja hesi burtur úr rúgvuni*
*Jon Heystoy*

# Klokkuklár mál fyri svimjingina

**Málini eru nógv hjá nývalda svimjiformanninum. Men tey eru øll rættiliga ítøkilig, og sjálvur sigur Jon Hestoy, at hesi skulu røkkast innan næstu 18 mánaðirnar**

SVIMJING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Jon Hestoy hevur eina greiða ætlan fyri føroyska svimjing, nú hann fyri triðju ferð hevur sett seg í formansstólin*

Vaktarskifti var í Svimjisambandinum leygardagin. Formaðurin seinastu fýra árini, Palli Ziskason, takkaði fyri seg, og í hansara stað varð valdur Jon Hestoy.

Jon er ikki hvør sum helst innan føroyska svimjing. Sum svimjari prógvaði hann, at tað ber til at røkka høgum málum, og eisini hevur hann átt síni nógvu ár sum formaður fyri Svimjisambandið, har hann í tveimum skiftum longu hevur virkað sum formaður.

## Fýra súlur

Tí er tað sjálvandi ein maður við sínum hugskotum, sum nú hevur sett seg í formanssessin.

- Eg havi sjálvandi alla tíðina havt mínar tankar um, hvussu vit kunnu menna føroyska svimjing. Og í tí, sum eg havi lagt fram á aðalfundinum, havi eg valt at fokusera á nøkur ítøkilig mál ,sum eg havi býtt upp í fýra súlur: Umsitingarliga arbeiðið, útbúgvingarpartin, ungdómsarbeiði/breidd og so elitupartin, sigur Jon Hestoy.

- Út frá hesum eru so sett ein rúgva av parts-málum, sum vit eiga at fremja í verki. Tað kann tykjast, sum eru hesi partsmál ógvuliga rúgvusmikil, og í framløgu mínari fyltu tey hálvaaðru A4-síðu. Men samstundis er talan um mál, sum vit kunnu røkka, um vit megna at skipa umsitingarliga partin nóg væl. Og ikki minst ber til at røkka hesum, uttan at vit skulu broyta alt samfelagið kring okkum.

- Nú verður hetta formansskeiðið bara 18 mánaðir, tí roknskaparárið verður broytt, men sjálvur haldi eg, at skal eg kunna kalla hesar 18 mánaðirnar fyri eina succés, so eiga øll málini, sum sett eru, at vera rokkin. Ella í øllum førum vera komin væl áleiðis, sigur Jon Hestoy.

Enn er eingin tíðarfesting gjørd á ymsu málunum, og Jon sigur, at tað er tilvitað, at hetta ikki er gjørt.

- Tá eg setti meg við mínum uppleggi, ætlaði eg upprunaliga at gera tíðarfestingar á ymsu punktini. Hinvegin kom eg til ta niðurstøðu, at øll eiga at kunna røkkast heilt skjótt. Tí ræður kanska meira um at skipa nevndararbeiðið eftir hesum málum, og mín ætlan er so, at vit á fyrsta nevndarfundinum seta upp eina gerðalista yvir ymsu punktini, og at vit síðani arbeiða miðvíst fyri at fremja hesi í verki, sigur nýggi formaðurin.

# Mugu tora við elituni

**Sum fyrrverandi elitusvimjari kennir Jon Hestoy krøvini, sum skulu til, um svimjingin skal røkka nóg langt. Og millum málini, sum nú eru sett, er eisini at fáa myndugleikarnar við í spælið at eggja føroysku elituni at gerast enn betri**

SVIMJING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Framúr avrikini hjá føroyskari svimjing seinnu árini – og serstakliga Pál Joensen – hava givið føroyskari svimjng eina vón um eina sonevnda Pál-effekt, har avrikini hjá trífalda EM-vinnaranum kunnu kveikja ein enn størri áhuga fyri svimjing kring landið.

Og Jon Hestoy slær fast, at avrikini hjá Pál bera við sær, at føroysk svimjing í dag stendur í eini einastandandi støðu, tá tosað verður um at fremja elitumenning.

- Møguleikin, sum Pál hevur givið okkum, er, at vit ikki skulu argumentera út frá eini hugsaðari støðu um, hvussu langt vit kundu rokkið, um vit høvdu hesar ella hasar karmar. Veruleikin er, at vit í dag eiga ein trífaldan europameistara, og tað er prógv um, at vit eisini í Føroyum eiga talentini, sum kunnu vinna allan vegin á mál.

- Tað, sum er umráðandi í hesum sambandi, er, at vit tora at taka tey allar bestu burtur úr rúgvuni og stuðla hesum. Sjálvandi skulu tilboð vera til øll, tí uttan breidd er eingin elita. Men samstundis mugu vit tora at kalla ein spaka fyri ein spaka, soleiðis at vit pilka tey allar bestu burturúr, og geva teimum ein møguleika at satsa upp á ítróttina. Skulu vit veruliga lyfta tey fremstu upp, so mugu vit tora at velja hesi burtur úr rúgvuni, sigur Jon Hestoy.

Tí er eitt av málum hansara eisini at koma í samráðingar við Mentamálaráðið og skúlaleiðslur um elituspurningin, soleiðis at fíggjarligu og útbúgvingarligu karmarnir vera best møguligur hjá fremstu føroysku ítróttarfólkunum.



*Pál Joensen er eitt ítøkiligt dømi um, hvussu langt kann røkkast við miðvísum arbeiði. Og tað gevur føroyskari svimjing ein einastandandi møguleika í samskiftinum við myndugleikarnar, heldur Jon Hestoy*

# Piotr heldur fram í Vágum

**Piotr Krakowski skal standa á odda fyri 07Vestur, tá vágamenn aftur fara at royna seg í Formuladeildini**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*

07Vestur og Piotr Krakowski hava í kvøld gjørt avtalu fyri næsta kappingarár.

Piotr hevur í ár vant 07Vestur, og tað hevur gingið væl, tí vágamenn hava spælt seg upp í bestu fótbóltsdeildina.

- Tá hetta samstarvið hepnaðist so væl, og úrtøkan gjørdist tann best hugsandi, nevnliga príðiligasta hálspríðið og pláss í Formuladeildini, var nærliggjandi at leingja avtaluna, sigur 07Vestur á heimasíðu sínari.



*Piotr Krakowski hevur í ár stýrt 07 Vestur upp í Formula-deildina. Og hann fer eisini at standa við stýrisvølin í 2009*